# Fulltrúar til kolvetnisskattadeild

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík, røkja raksturin.

Núverandi setanarøki er Klaksvík, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, í hendi í seinasta lagi **15. oktober 2001**

*Toll- og Skattstova Føroya Stýrið*
*Postboks 2151*
*FO 165 Argir*

Søkt verður eftir tveimum løgfrøðingum og tveimum roknskaparfrøðingum til nýggju kolvetnisskattadeildina í Klaksvík at byrja so skjótt til ber. Fyrisitingin er nýggj í føroyskum skattahøpi, tí fáa umsøkjararnir at byrja við eina rættuliga sjálvstøðuga uppgávu saman við deildarleiðaranum at byggja upp eina kolvetnisskattafyrisiting.

**Høvuðsuppgávurnar verða eitt nú:**

- at taka avgerðir í principiellum spurningum, har siðvenja enn ikki er løgd, herundir gera tilmælir í slíkum spurningum til Toll- og skattaráðið,
- fyrireika neyðug skjøl og leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðingar sambært kolvetnisskattalógini og kolvetnisskattafyrisitingarlógini,
- at leggja innanhýsis mannagongdir til rættis,
- at skipa fyri bæði innan- og uttanhýsis kunning,
- at álíkna/grannskoða roknskapir frá loyvishavarum,
- at taka sær av álíkning, roknskapareftirliti/grannskoðan, skráseting og viðgerð av upplýsingum um útlendsk vinnurekandi og útlendskar løntakarar, sum eru umfataðir av kolvetnisskattalógini,
- at gera krøv galdandi um ábyrgd fyri skatti, avgjøldum v.m.,
- at viðgera kærur,
- at vera við at skipa fyri útbúgving av starvsfólkum,
- at hava samband við útlendskar kolvetnisskattamyndugleikar o.a.m.
- og at virka sum ráðgevi hjá politiska myndugleikanum í løgfrøðiligum og roknskaparligum spurningum innan kolvetnisskattingina.

Uppgávurnar verða at byrja við loystar í felag av bæði løgfrøðingum og roknskaparfrøðingum. Um kolvetnisframleiðsla fer í gongd, verða uppgávurnar meira náttúrliga býttar upp í ein løgfrøðiligan og ein roknskaparligan part, samstundis sum ein partur av álíkningaruppgávunum verður lagdur á Tvøroyri.

**Førleiki**
Umsøkjarar til løgfrøðiligu størvini skulu hava útbúgving sum cand. jur. ella líknandi útbúgving. Roknskaparfrøðingarnir skulu hava roknskaparliga útbúgving á slíkum stigi, sum ger teir førar fyri at viðgera torgreiddar roknskaparligar spurningar.

**Vit bjóða**

- eitt spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga,
- at vera við til at leggja títt egna arbeiðspláss til rættis frá byrjanini av
- flextíð
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Spurningar hesum viðvíkjandi** kunnu setast Stýrinum, Marjun Reinert Simonsen ella Óla Heinesen tlf. 352600.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3076, P/F Tele F, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
03.09.2001.
Kapitalur:
Lækking við kr. 2.992.000,00 til kr. 8.000,00 til rindan av halli
Hækking við kr. 2.592.000,00 til kr. 2.600.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 1.296.000,00 til kurs 100,3086 og kr. 1.296.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100,3086.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Ari Johannsson, Bæjargil 65, ÍS-210 Garðabæ.
Innkomin í nevndina:
Eyðtór Arnalds, Háteigsvegur 33, ÍS-105 Reykjavík.

Skráseting Føroya tann 21. september 2001

Kristin Balle






**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1513, P/F Jørgen Christiansen, 187 Hvítanes.

Viðtøkur broyttar:
06.09.2001.
Nýtt hjánavn: P/F Blink Hús (P/F Jørgen Christiansen)

Skráseting Føroya tann 21. september 2001

Kristin Balle

# Hjálparfólkaskeið

Skeið fyri hjálparfólki og fyri teimum, sum kundu hugsað sær at starvast sum hjálparfólk á dagstovnum og bústovnum, byrjar á Læraraskúlanum 29. oktober.

Skeiðið er í tríggjar vikur og skiftir ímillum undirvísing og vitjanir á stovnum/arbeiðsplássum innan nevnda arbeiðsøki.

Fakliga innihaldið á skeiðinum er m.a. sosiala, kensluliga, málsliga, sansaliga og rørsluliga menningin hjá børnum.

Pedagogikk við atliti at hjálparfólkastarvi, eitt nú spæl og læra.

**Professionella arbeiðsplássið**
Eygleiðing, lógartilfar, reglugerðir, etikkur
Samskifti og samstarv millum starvsfelagað og onnur
Matur og heilsa
Arbeiðsstøður.

Eisini verður nomið við arbeiðið sum dagrøkt.

Kostnaðurin er 9000,- kr. tá er døgurði og millummálar við í prísinum teir dagarnar, undirvíst verður á Læraraskúlanum.

Tilmelding innan 15. oktober á

**Føroya Læraraskúla**
Postboks 348, tlf. 313501
Teldupostur flsk@flsk.fo

# Goymslufólk/ Avgreiðslufólk

Søkt verður eftir goymslu/avgreiðslufólki til mjólkarvirkið í Hoyvík.

Viðkomandi skal vera álítandi og fyrikomandi, og eisini skal hann/hon hava koyrikort.

Umsóknir við møguligum viðmælum skulu sendast ***áðrenn mánadagin 3. oktober 2001*** til:

**L/F MBM**
Búnaðardepilin
FO-410 Kollafjørður

Merkt: Umsókn

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

# Eysturskúlin

## Tórshavn

Mikukvøldið tann 26. september kl. 19.00 skipar Eysturskúlin fyri felags foreldrafundi fyri foreldrum at næmingum í 7. til10. flokki.

Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, heldur fyrilestur við heitinum »Harðskapur og happing millum ung«. Høvi verður eisini at seta spurningar.

# Leiga av fimleikahallunum

Tey, ið ætla at leiga fimleikahallirnar (á Glyvrum og í Søldarfirði) veturin 2001/2002, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 28/09-2001.



**Runavíkar býráð**



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**FÝRA FELGUR**
til Rover 200 til sølu fyri 1.600 kr. Nýprísur 2.600.
*Tlf. 316817*

**ISUZU LASTBILUR**
diesel, árg. 1988, bíliga til sølu.
*Tlf. 373450*

**NISSAN SUNNY 1.4 GL**
diesel, árg. 86, sýnaður 2001 bíliga til sølu.
*Tlf. 255551*

**FORD FIESTA**
árg. 90, bilurin hevur plátur, men krevur onkrar ábøtur, til sølu fyri uml. 4.000,- kr.
*Tlf. 221282*

**FORD FIESTA 1.3**
Ford Fiesta Classic 1.3 Sport Classic, reyður, í sera góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 371983*

**TOYOTA CAMRY**
til sølu, árg. 88, í góðum standi, koyrir væl, 8500 kr.
*Tlf. 448663 ella 222030*

**TOYOTA HIACE 2.4 DIESEL**
til sølu, er 8 ár, hevur pláss til 8 ferðandi + førara, hevur koyrt 220.000 km er í góðum standi.
*Tlf. 448622 ella 225357*

**PASSAT 1.9 TDI**
árg. 94 til sølu, við skaða. 1 stk. motor turbo diesel 1.6 n gearkassi.
*Tlf. 282071 ella 333270*

**OPEL ASCONA**
árg. 86 til sølu fyri 2.000 kr. Bilurin koyrir og hevur plátur.
*Tlf. 210821*

**BILAR TIL SØLU**
Ford Granada 2.8i 170 HK, kr. 12.000,- nýsýnaður • Bilar til sølu við 3 mðr. trygd: BMW 525 tds. Diesel, árg. 07/96. Boð undir 250.000 ongan áhuga • Volvo 440 TDI Diesel árg. 06/94 • Audi 100 Sedan 2.5 TDI diesel árg. 10/93 galvaniseraður • Audi 80 1.9 TDI diesel árg. 05/94 galvaniseraður • Myndir síggjast á www.bilar.foÚrvalsbilar Spf.Bakkavegur530 Fuglafjørður
*Tlf. 444943 ella 217704*

**FORD GRANADA 2.8i**
170 HK, kr. 12.000,- latin nýsýnaður,Úrvalsbilar Spf.Bakkavegur530 Fuglafjørður
*Tlf. 444943 ella 217704*

**RENOVERINGSPROJEKT TIL SØ**
Ein Nissan Cherry 15i turbo og ein Nissan Bluebird 18i til sølu. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 448796*

**FORD SIERRA 1.6 BN**
st. car, vínreyður, árg. 86, sýnaður í 2000. Sær gott út og er í góðum standi, bíliga til sølu. Ring og gev eitt boð.
*Tlf. 227457 ella 226587*

**FORD FIESTA 1.1**
til sølu. Krevur ábøtur, hevur alu. felgur við nýggjum dekkum + anhangara gjørdur úr einum Fiesta.
*Tlf. 315713 eftir kl. 17*

**NISSAN MICRA**
til sølu, árg. 99, koyrt 14.000 km, er vínreyður, økonomiskur bilur. Eldri bilur kann ganga inn í keypið.
*Tlf. 226772*

**BILUR TIL SØLU**
Mercedes Benz 300 diesel, árg. 89, 221.000 km, autom. gear, el-sóltak, el-spegl, krók og fløguspælara. Bilurin er vælhildin og sær gott út. Prísuppskot 118.000 kr.
*Tlf. 223192*

**MAZDA 323 1,3**
til sølu fyri 7.000 kr. Nýsýnaður.
*Tlf. 252072*

**CITROËN BX 16**
bíliga til sølu.
*Tlf. 315446*

**TIL SØLU**
Nissan Sunny GL 1,5 bíliga til sølu. Góður til eykalutir.
*Tlf. 317420 ella 254460*

**PÍKADEKK**
4 píkadekk Firestone 185/65/14 á felgum til m.a.Galant, bert brúkt 4-5 dagar til sølu fyri 3500 nýprísur uttan felgur 4200 kr.
*Tlf. 214470*

**FORD ESCORT 1.3 CL**
árg. 87, hvítur, koyrt 132.000 km, til sølu.
*Tlf. 457625*

**MAZDA 626**
árg. 85, nýsýnaður. VW bussur árg. 78, (veteran) krevur ábøtur.
*Tlf. 447685 ella 250728*

**TIL SØLU**
Ford Granada 2,8i 170 HK kr. 12.000, nýsýnaður. Bilar til sølu við 3 mðr. trygd: • BMW 525 tds diesel, árg. 7/96. Boð undir 250.000 ongan áhuga. • Volvo 440 TDI diesel, árg. 6/94. • Audi 100 Sedan 2,5 TDI diesel, árg. 10/93, galvaniseraður. • Audi 100 stationcar 2,5 TDI diesel, árg. 11/92, galvaniseraður. • Audi 80 1,9 TDI diesel, árg. 05/94, galvaniseraður. Myndir síggjast á www.bilar.fo.
*Úrvalsbilar - tlf. 217704 & 444943*

**FORD GRANADA 2,8 i**
170 Hk, nýsýnaður, til sølu fyri 12.000 kr. Úrvalsbilar Spf. Bakkavegur, 530 Fuglafjørður.
*Tlf. 444943 - 217704*

**TOYOTA CARINA II**
Árg. 86, koyrir væl, men krevur ábøtur. Kann brúkast til eykalutir.
*Tlf. 217779*

**CITROEN XANTIA**
Árg. 11/97, koyrt 115.000 km. til sølu.
*Tlf. 259270*

**TOYOTA CARINA II**
Árg. 88 til sølu.
*Tlf. 320316*

**SPORTFELGUR**
4 alufelgur v/ dekkum, passa til fleiri sløg av bilum. Boltasirkul 4x100 og 4x108.
*Tlf. 456921*

**PICKUP CHEVROLET**
Custom D20, árg. 91, til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 223012*

**REYÐUR VW GOLF GTI**
Árg. 87 til sølu. Sær sera gott út og er í góðum standi. Cd-spælari við radio fylgir við.
*Tlf. 321816 e. kl. 17*

**4 GÓÐ PÍKADEKK**
á felgum til sølu. Stødd: 185/65 R14
*Tlf. 421101*

**DEAWO NEXIA 1,5**
Árg. 97, koyrt 65.000 km., til sølu. Er í sera góðum standi. Nýsýnaður.
*Tlf. 448210*

**TOYOTA COROLLA**
hevur plátur, men krevur ábøtur. Kann eisini brúkast til eykalutir. Hevur nýtt útstoyt.
*Tlf. 310310*

## Amboð

**BINGJA**
til ikki brennbart ynskist 6 x 2m.
*Tlf. 332045*

**NÝGGJ ROYTIMASKINA**
til sølu.
*Tlf. 457775*

## Arbeiði

**ARBEIÐI YNSKIST**
14 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð. Helst á Argjum ella í Havn. Alt hevur áhuga.
*Tlf. 253063 ella 318667*

**ARBEIÐI YNSKIST**
Maður søkir arbeiði sum dekkari ella maskinmaður. Helst í Suðuroynni.
*Tlf. 253141*

**ARBEIÐI**
14 ára gomul genta ynskir arbeiði í Havn aftaná skúlatíð.
*Tlf. 319199 ella 256769, Annika*

**GREVSTUR**
Alt arbeiði við mini gravmaskinu verður gjørt í t. d. havum o. ø.
*Tlf. 217691 - 317691*

## Barnaansing

**DAGPLEYGUMAMMA**
søkist til 1/2 ára gomlu Birnu uml. 10 dagar um mðr. frá 1. november at rokna.
*Tlf. 317705 ella 255961*

**ER TAÐ NAKAR**
ið kann ansa eftir Sáru, ið er 5 1/2 mðr. gomul, seinnapartar í 4 tímar. Vinarliga ring til Elin á
*tlf. 361394*

**1. OKT. FLYTA VIT**
til Havnar og sóknast tí eftir onkrum at ansa okkum meðan foreldur okkara eru til arbeiðis. Vit eru ein drongur á 4 ár og ein genta á 6 mðr.
*Ringið 216990 ella 212490*

## Barnaútgerð

**BILSTÓLUR**
Renolux 0-18 kg. til sølu fyri 450,- kr. Barnastólur úr bók til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 319190*

**BRIO KOYRISTÓLUR**
Sera vælhildin koyristólur tern/myrkabláur v/ galesju og koyriposa til sølu fyri 1.600,- kr.
*Tlf. 322371*

**BARNAVOGNUR YNSKIST**
Svartur barnavognur av merkinum Simo og ALU stelli ynskist til keyps.
*Tlf. 224963 ella 315757*

**BARNAVOGNUR TIL SØLU**
Brio barnavognur við lyft og seðlum, bert brúktur til eitt barn, til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 316817*

**BILSTÓLUR**
Britax bilstólur,upp til 13 kg. bert brúktur til eitt barn, til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 316817*

**YNSKIST**
Barnasong við rimum og botni, sum kann flytast upp og niður, ynskist bíliga til keyps.
*Tlf. 321064*

**HEVUR NAKAR**
eina bíliga barnasong til sølu, við tremmum, og botni sum kann flytast upp og niður.
*Tlf. 321064 ella 361435*

**BLÁUR BARNAVOGNUR**
við babylift og puslitasku, keyptur úr Skemmuni, til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. 313414*

**WEEKEND SONG**
Brúkt eina ferð, til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 322183*

## Bátaútgerð

**TIL SØLU**
Perkins TD 140 motorur til sølu fyri 18.000 kr.
*Tlf. 317511 ella 221578*

**BÁTAMOTORUR TIL SØLU**
Ein Marna diesel 18 HK við aksilgreiðum og skrúvu til sølu.
*Tlf. 333168*

## Bingo

**SEYÐABINGO**
Stórt seyðabingo verður í Skálanum mánakvøldið 1. okt. kl. 19.30. Hópin av góðum vinningum. Lýst verður nærri seinni.
*Bygdarfelagið Báran í Árnafirði*

**FRÁ EYDNUNI**
Gott bingo verður sunnudagin 30. sept. kl. 16. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1 lamb, eykaspælið 1800 kr. Drigið verður millum spølini.
*Eydnan*

**BINGO**
verður í Felagslonini í Fuglafirði, hóskvøldið 27. september kl. 19.30.
*Eldrafelagið Borgin*

**BINGO**
verður í nýggja billiardhúsinum í Garðatúni ónskvøldið 26. september kl. 19.30.
*Vágs Billiardfelag*

**KAGGIN**
Gott bingo verður leygarkvøldið 29.9. kl. 19.00. 15 vinningar á lutaseðli m.a. 3 gávukort á 1000,- Spælt verður eisini bingaloo og eykaspæl.
*Kaggin*

**GOTT BINGO**
verður í TB-húsinum tórsdagin 27. sept. kl. 19.00. Høvuðsvinningur 1 Apex Føroyar-Keypmannahavn, hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
*Tvøroyrar Bóltfelag*

**HEIMABINGO HJÁ 7. FL**
Heimabingo hjá 7. fl. í Vágs skúla. Hesi tlf. nr. hava vunnið: 373521, 373359, 373070, 373037, 373922, 373402, 259088, 373465, 373492, 373988. Takk fyri stuðulin.
*Vinarliga 7 b.*

**SEYÐA OYGGJARBINGO**
verður í skúlahøllini 8. okt. kl. 19.00. 20 lomb verða at vinna, harumframt olja og bensin.
*Flogbóltsdeildin TB*

**FRÁ STRÁLUNI**
Gott bingo verður á Strondum sunnudagin 30. sept. kl. 16.00. Burturlutað verða m.a. trý føroysk krov í heyst. Eisini verða lúkur at lata upp.
*Strálan*

**BÁRU-BINGO**
Heimabingo fæst til keyps á posthúsinum og í sølubúðum um alt landið. Tú sært beinanvegin um tú hevur vunnið.
*Bygdarfelagið Báran í Árnafirði*

## Bøkur

**BØKUR TIL HANDILSSKÚLAN**
Vantar tær bøkur til Handilsskúlan? Uml. 15 bøkur til HH og FHS bíliga til sølu, harímillum spildurnýggjar dansk/týsk týsk/dansk handilsorðabøkur. Nærri fæst at vita á
*Tlf. 315907, eftir kl. 17*

**YNSKIST**
Spansk/Dansk og Dansk/Spansk orðabøkur ynskjast til keyps.
*Tlf. 317673 e. kl. 15*

## Burturm. /funnið

**BURTURMIST 14. SEPT.**
Er nakar, sum hevur sæð »løbehjulið« hjá mær ella funnið tað, verður viðkomandi vinarliga biðin at siga frá á
*Tlf. 422352, Pauli*

**DÝNUJAKKI**
Reyður dýnujakki (anorakkur) str. 8 er gloymdur onkustaðni í Havn. Vinarliga ring
*tlf. 315548, Jórunn*

## Býli

**KAMAR TIL LEIGU**
Gott kamar, nær miðbýnum í Havn, til leigu til friðarlig fólk. Atgongd til køk og bað.
*Tlf. 214674*

**KAMAR YNSKIST**
Ungur friðaligur drongur í læru, ynskir kamar við atgongd til køk og bað, í Tórshavn nær NomaTek.
*Tlf. 456549*

**STÓRT**
kollegiekamar í Keypmannahavn til framleigu frá 1. okt. 2001 til 1. juli 2002.
*Tlf. 0045 26848188*

**KAMAR TIL LEIGU**
við atgongd til køk og bað fyri 2.000 kr. um mðr.
*Tlf. 254331 eftir kl. 18*

**VERILSI TIL LEIGU**
Gott verilsi til leigu v/ atgongd til stóran køk, bað og vaskimaskinu, frá 1.10. til ikki roykjara.
*Tlf. 313799 ella 221158*

**HÚS Í KLAKSVÍK**
ynskjast til keyps ella leigu.
*Tlf. 456238*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Vit eru eitt ungt par, sum søkja íbúð á Toftum, Saltnes ella í Runavík skjótast gjørligt, max. 3500 kr. um mðr. við el og hita. Vinarliga ringið á
*tlf. 226090 ella 252351*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Íbúð ynskist til leigu í Tórshavn, max. 3.000 kr. pr. mðr. helst tvey kømur.
*Tlf. 258769*

**HÚS Á TVØROYRI**
Hús í Líðini á Tvøroyri til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 372137 ella 374008*

**ÍBÚÐ YNSKIST 1. NOV.**
28 ára gamal pedagogur søkir íbúð í Havn, Leynum, Kollafirði ella Vestmanna, eri ikki roykjari.
*Tlf. 421566 ella +45 59442561 Jakob*

**ER ÍBÚÐIN UPPSØGD?**
Hava tygum eina tóma íbúð í Havn, Velbastað, Leynum, Kollafirði, Kvívík ella Vestmanna frá 1. nov.? So eri eg ógvuliga áhugaður. Jakob 28 ár, ikki roykjari, pedagog.
*Tlf. 421566 ella +45 59442561*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
***(set X)*** undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ .......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12[00], t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:.............................................
Bústaður:.........................................
Bygd/býur:........................................
Tlf.: ............

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki